# Ein prædikum



## Túsundvís fylgdu honum til gravar. Ungdómar gingu í t-shirtum við mynd av honum á og tekstinum: »Ein rødd av rættvísi í eini tíð av tøgn«

**Miðeystur**

**Johan Jacobsen**
johan@sosialurin.fo

Hvør var Abu al-Qaqa? Jú, hetta er kanska tann mest óviðkomandi spurningurin at seta í vikuni, tá ið so mætir og týðandi menn, sum Clinton og Blix hava vitjað. Men Irak, saman við kjarnorkuvápnum, hava verið uppi og vent í kjakinum. Abu al-Qaqa, eisini kendur við hansara upprunaliga navni Mahmud al-Aghasi, var ein av fleiri prædikumonnum í miðeystri, sum tala harðliga ímóti amerikonsku innrásini av Irak. Men samstundis talaði hann ímóti al-Qaida í einstakum prædikum ráddi hann ungum frá at fara til Irak í kríggj. Á heimasíðum og kjaksíðum fekk hann nógvar ákoyringar frá al-Qaida viðhaldsmonnum fyri at vera í lummunum á sýrisku myndugleikunum. Drápsmenninir sigast at vera irakar og hava tilknýti til al-Qaida.

Í Sýria verður dúgliga kjakast um prædikumannin, ið dróg í túsundatali av ungum aleppo-búgvum til moskuna har hann helt sínar eftir hondinum kendu talur, ið m.a. forbannaðu amerikonsku hersetingina í grannalandinum Irak. Spurningar, sum neyvan heilt vera svaraðir, verða settir: hvør drap hann, ella heldur, hví varð hann myrdur? Grovu linjurnar til ein modernaðan amr. action/thriller film eru teknaðar upp. Men hetta er altso tann poltiski veruleikin, sum nú flestu sýrar einaferð fyrihalda seg til.

Sami Moubayed skrivar regluliga fyri Asia Times. Hann er sýri og søgufrøðingur, og eftir hansara greinum at døma, helst eitt slag av einum loyalum stjórnar-spindoktara. Undir heitinum »An Anti-US voice




## Irakisk flóttafólk í Sýria

ST metir, at 1.4 milliónir milliónir irakisk flóttafólk eru komin yvir um markið til Sýria. Hetta merkist m.a. á prísum í sýriska høvuðsstaðnum. Tilsamans metir ST at 2.2. milliónir irakar eru fluttir úr Irak eftir 2003.